# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

P/F Havnar Timburhandil:

## Jørmann Petersen nýggjur stjóri



Jørmann Petersen í Hoyvík er settur í starv sum stjóri í P/F Havnar Timburhandli.

Jørmann er 33 ára gamal og er ættaður úr Sandavági. Hann er útbúgvin cand. merc.aud (revisorkandidat) frá handilsháskúlanum í Keypmannahavn. Hann hevur starvast sum grannskoðari hjá Rasmussen &Weihe í seks ár og sum deildarleiðari á Fiskimálaráðnum í tvey og eitt hálvt ár.

Jørmann er búsitandi í Hoyvík saman við konuni Brynhild og dóttrini Ronju.

Samstundis sum Jørmann tekur við stjórastarvinum, fer Heini Fosaa frá sum stjóri, og hevur tikið við sum nevndarformaður í felagnum.

## Andlát og jarðarferðir

**Eileen Thomsen**, Lopra, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin, 14. februar, 74 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum til Smyril fríggjadagin, 17. februar, kl. 11. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju í kirkjugarðin á Leitið leygardagin, 18. februar, kl. 13.30.

**Betrea Jacobsen**, Miðvágur, andaðist mánadagin 13 februar, 75 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Prógv



Rúnar Reistrup úr Tórshavn hevur við Århus Universitet lokið prógv sum cand.mag. í kunningarfrøði (Informationsvidenskab)





Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin

"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Hákun Leivur Jeonsen**
(Hákun á Líknargøtu)

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk fyri blómur, kransar, gávur og heilsanir og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Noomi**


Fjeppari?
Les um ítrótt í Sosialinum




## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vístu samkenslu í stóru sorg okkara, tá ið okkara elskaði pápi, abbi, langabbi, verfaðir og bróður

**Karl Esbern Andreasen**
Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Takk til Ólavur í Mittúni, Hanus Simonsen, Hans Eiler Hammer, Niels P. Danielsen og Poul Johannes Johannesen fyri troystarrík orð.
Takk til kirkjutænarar, tónleik, sangarar, bilførarar og gravarar.
Takk til Heimarøktina, starvsfólkini á Norðoya Røktarheimi og Klaksvíkar Sjúkrahús fyri kærleika, umsorgan og røkt.
Takk til KFUM & K og hjálparfólk fyri vælvild og hjálp í sambandi við ervið.
Takk til tykkum, sum hjálptu okkum við ervinum.
Takk til familju og vinir fyri alla hjálpina.
Takk fyri allar gávurnar, sum vórðu latnar til KFUM & K.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Harrin gav og Harrin tók, Harrans navn veri lovað.
Hjartans tøkk øll somul

**Børnini v/ familju**

## Krúndiamantbrúdleyp

Hósdagin 16. februar hava Martha og Steingrim Simonsen í Vestmann verið gift í 65 ár. Dagurin verður hildin í heiminum á Hallarvegi 12 saman við familjuni.

## Móttøka

Í Samband við at vit eru flutt í nýggj hølir á Heiðavegi 31, Saltangará bjóða vit viðskiftafólki okkara inn á gólvið nú fríggjadagin 17. februar millum kl. 15 - 18.

*Starvsfólkini*

**Grannskoðarastovan**
**480 Skáli**

## Dagurin í morgin

**16. februar. Juliana**, deyð umleið ár 300. Vildi ikki giftast heidna trúlovaða sínum og varð tikin av døgum. Er eisini navn á tveimum øðrum halgikvinnum. *Giljanna* er føroyski navnaformurin. Juliana er rómverskt ættarnavn.